## Tryggari ferðsla við brúnna

Alsamt økta ferðslan um brúnna um Streymin hevur nú við sær, at ein undirføring verður gjørd millum báðar bygdirnar norðanfyri og sunnanfyri brúnna Eysturoyarmegin – altso Norðskála og Oyrarbakka. Tað skrivar Sunda kommuna á heimasíðu síni. Plássið, har verandi undirføring er, verður nýtt til endamálið. Tað merkir, at tá arbeiðið er liðugt, sleppur øll ferðsla millum Norðskála og Oyrarbakka undir vegin, og ferðslan tvørtur um brúnna verður sostatt ikki órógvað av hesum. Eftir ætlan verður farið í gongd við arbeiðið sum skjótast, so ferðslan við brúnna verður tryggari innan stutta tíð.




## 66 handtikin fyri barnaporno

Spanska løgreglan hevur handtikið 66 persónar og lagt hald á milliónavís av myndum og videobrotum, nú ein barnapornoringur er avdúkaður. Tilsamans er talan um 48 milliónir myndir og videoklipp, spreitt út á 89 harddiskar, 16 farteldur og 1200 fløgur. Millum tey handtiknu vóru bæði lærarar, sakførarar, arkitektar og læknar, og hevði ein teirra 21 harddiskar við barnaporno. Tað er, sambært sponsku løgregluni, tað mesta, sum nakar einstakur persónur er handtikin við.

# Norrøna trupul hjá suðuroyingum

**Fólk úr Suðuroy, sum ætla sær við Norrönu mánamorgun, mugu úr oynni sunnukvøld. Hetta hóast Smyril er í Havn ein hálvan tíma áðrenn fráferð mánamorgun**

FERÐING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Ferðafólk úr Suðuroynni mugu til Havnar sunnukvøld, fyri at kunna liva upp til boðini frá Smyril Line um, at ferðandi við bili skulu standa klár á keiini hálvanannan tíma áðrenn fráferð*

*savnsmynd*

Summarið er komið og fólk fara í feriu. Fleiri leita sær av landinum, til sól og hvítar strendur. Fyrsta stig á leiðini út í heim, er annaðhvørt ein ferð við Atlantsflog ella Norrönu.

Men áðrenn komið er so langt, er neyðugt at chekka inn – og tað tekur tíð. Skalt tú við Norrönu verður kravt av tær, at tú stendur klárur á keiini hálvanannan tíma áðrenn fráferð. Tað vil siga, at í seinasta lagið kl. 7.00 sum skipið siglir kl. 8.30. Gert tú ikki tað, kanst tú rokna við at standa eftir – so einfalt er tað.

»Ferðafólk við bili í seinasta lagi 1 1⁄2 tíma og við ongum bili 1 tíma fyri fráferð.«, stendur í reglugerðunum um innskriving hjá Smyril Line.

### Rakar suðuroyingar

Tey flestu í meginøkinum hava ongar trupulleikar av hesum, men hjá suðuroyingum er tað problematiskt. Tí Smyril, sum fer av Tvøroyri kl. 6.00, er ikki á Havnini fyrr enn kl. 7.55 sum Norröna loysir kl. 8.30. Og tá Smyril Line krevur, at ferðafólk bili á Norrönu standa klár hálvanannan tíma áðrenn fráferð, uppfylla ferðandi úr Suðuroy ikki hesar treytir og sleppa ikki umborð. Eisini hóast Norröna liggur við kei og fer ongan veg næsta hálva tíman eftir at tey eru komin til Havnar.

Við øðrum orðum merkir tað, at suðuroyingar sum ætla sær við Norrönu ein mánamorgun, mugu fara av oynni kl. 17.30 sunnukvøld og gista onkrastaðni í miðstaðarøkinum, soleiðis at tey kunnu liva upp til krøvini hjá Smyril Line.

### Øll somu viðferð

Áður hevur annars borið til hjá suðuroyingum at fara úr Suðuroynni sama dag sum Norrönu fer, men hetta ber ikki til longur. Hví ikki, hava vit spurt hjá Smyril Line?

– Vit hava havt ein trupulleika við, at Norröna ikki kom avstað til tíðina og tað kostar okkum nógv. Nú hava vit so gjørt av, at øll okkara ferðafólk skulu hava somu viðferð, og skulu møta hálvanannan tíma áðrenn skipið fer. Tí var Smyril ov seinur, so vóru vit ov sein avstað. Tað merkir, at vit vóru seinkað í Danmark, og har skulu onkur ferðandi náa aðrar ferjur, sum tey so blíva ov sein til, og soleiðis blívur tað við.

Jákup Sverri Kass sigur, at tað eisini kann tykjast órættvíst hjá hinum ferðandi, at tey skulu møta so langt áðrenn fráferð, tá onnur hava kunnað koyrt beinleiðis umborð á Norrönu.

– Men nú er ferðaætlanin eisini broytt soleiðis, at tey sum koma úr Suðuroy bara hava ein hálvan tíma at geva av, og ikki ein heilan tíma sum fyrr. Og tað er ov lítið, sigur Jákup Sverri Kass.

Tískil fáa suðuroyingar nú boð um, at teir – eins og øll onnur – skulu møta hálvanannan tíma áðrenn Norröna fer.

### So nógv ferðandi

Eitt annað, sum eisini ger seg galdandi nú, er av ferðafólkatalið nógv økt seinastu árini.

– Vit hava ongantíð áður havt so nógv ferðandi. Og tá orsøkin til, at ferðandi við bili skulu møta hálvanannan tíma áðrenn fráferð, hevur nakað við stúving av bilum at gera, so mugu allir bilar standa klárir samstundis, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann vísir á, at fyri at gagnnýta plássið umborð sum best, er neyðugt at ymsu bilastøddirnar fara inn samstundis. Hetta so at skilja, at stóru bilarnir fara inn fyrst ella síðst, síðani teir við viðføriskassa á takinum og so framvegis.

– Og suðuroyingar hava ymsar bilastøddir, og tískil mugu teir møta klokkan sjey sum øll onnur, sigur Jákup Sverri Kass.

### Betri næsta ár

Men ber tað ikki til at tillaga ferðaætlanina soleiðis, at tað verður eitt sindur lættari hjá teimum úr Suðuroy at ferðast við Norrönu? Ikki í ár, sigur Jákup Sverri Kass. Hann vísir á, at ferðaætlanin er pakkað, so har ber ikki til at gera stórvegis broytingar.

– Men vit arbeiða við eini ferðaætlan fyri komandi ár, og har sær út til, at tað verður nakað høgligari hjá ferðandi úr Suðuroynni, sum ætla sær við Norrönu, sigur Jákup Sverri Kass.